# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

1. september fekk Eyðbjørg Højgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3250 gr.

1. september fingu Eyðna Hammer og Jann Thomsen, Streymnes, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4535 gr.

1. september fingu Barbara S. Norðbúð og Don Ey. Joensen, Innan Glyvur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

3. september fingu Elsa og Petur H. Jacobsen, Argir, eina dóttur. Hon var 59 cm. long og vigaði 5110 gr.

4. september fingu Judith Falkvard, Sørvágur og Høgni Joensen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

4. september fingu Sonja og Eyðun Kjølbro, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4500 gr.

4. september fingu Dorthea Ellingsgaard og Eljón D. Johannesen, Oyri, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3750 gr.

5. september fingu Krista og Olaf Davidsen, Æðuvík, ein son, sum eitur Ólavur. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4450 gr.

5. september fingu Rønn Eliasen og Pól Huus Sólstein, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3150 gr.

5. september fingu Hjørdis og Hans Óli Viberg, Toftir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4075 gr.

5. september fingu Vár og Djóni Tausen Joensen ein beiggja og foreldrini Haidi T. og Harey Joensen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4300 gr.

5. september fingu Poula Reinert Olsen og Hanus M. Olsen, Saltnes, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3580 gr.

6. september fingu Eyð Mohr, Fuglafjørður og Sjúrður Finnsson, Lamba, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

7. september fingu Sirikit og Eiler Jacobsen, Hoyvík, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3100 gr.

## Brúdleyp

Í dag, 10. september giftast í Vestmanna kirkju Gudrun Kjærbo úr Skopun og Óli Hans Olsen úr Vestmanna. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

## Prógv

Frá tí Føroyska Hárfríðkanarskúlanum fingu Marjun og Meibritt tann 28. august prógv sum hárfríðkarar við væl avrikað arbeiði. Rós.

## PhD

Anna Maria Svabo Jørgensen hevur 1. august fingið PhD prógv innan vinnu og leiðslu við University of South Australia, Adelaide. Ritgerðin snúði seg um týdningin hjá smáum feløgum innanheilsuøkið at skipa seg sjálvi og hava eftirlit við egnum viðurskiftum sum liður í professionaliseringsgongdini ímóti góðkenning innan tað regluliga heilsuverkið í Singapore. Bólkurin sum hevur luttikið í hesi verkætlan eru kiropraktorar, og granskingin var skipað sambært »Participatory Action Research« við endamáli at orða reglugerð hjá kiropraktorfelagnum sum fyrireiking til statsgóðkenning.

# Alma Frederiksen 99 ár

Góða omma
Hjartaliga tillukku við 99 ára degnum tann 11. september.
Tað er mær ein stór gleði at hava møguleika fyri at vera komin úr Danmark til Føroyar at feira dagin saman við tær.
Eg má siga tað, at eg eri stolt yvir at eiga eina ommu, ið er so røsk sum tú.
Eg havi gingið runt á ellisheiminum, har eg arbeiði í Danmark, og víst teimum bílæti av tær og drotningini og fortalt, at hetta er omma mín, ja eg eri stolt av tær.
Eg havi nógv góð minnir, frá tá eg var genta. Mær dámdi sera væl at vitja teg og abba, tú hevði altíð tíð til at práta og til at læra meg at binda, hekla og spæla kort og drekkamunn - ikki at gloyma - við einum søtum bita. Eg minnist eisini tá vit børn vóru sjúk, ja, tá var tú skjót at koma og sita hjá okkum,



við stokkum og geva okkum maltøl og bomm.
Tá vit vóru saman øll familjan, og vit børn funnu uppá okkurt býtt, sum at renna runt um stólar og spæla skemt, ja so var tú omma, altíð klár til at vera við, og tað var tað stuttligasta, at omma vildi vera við, og vit flentu so nógv. Ja, tú ert tann besta omma í verð, og eg gleði meg til aftur at koma til Føroya, um Gud vil, at feira tín 100 ára føðingardag.
Elskaða omma, eg ynski alt tað besta fyri teg, og túsund takk fyri alt tú hevur verið fyri meg. Jesus pápi vælsigni teg omma.
Heilsan

**Maiken**

# Maud Heinesen er farin



Maud Heinesen var eitt konubrot. Maud var Fróðskaparsetrið í mong ár. Hon var heilt frá byrjanini í 1965 tann, sum hevði skil á øllum fíggjarviðurskiftum, reglum og møguleikum, sum vóru verdir at troyta hjá setrinum. Hon legði dent á tað ítøkiliga og veruliga, hon fekk sveimandi hugskot niður á jørðina, og hon sá møguleikar, sum eingin annar sá. Setursframi lá altíð fremstur í huga hennara.

Vit sakna hana. Vit fóru at sakna hana beinanvegin, tá ið hon minkaði um arbeiðstíðina. Vit máttu ringja til hennara at spyrja um ráð og leiðbeining, tá ið á stóð. Maud mintist í staklutum mál og tilburðir, og hon var altíð til reiðar at hjálpa. Men hon hevði sæð til, at hon kundi leggja frá sær - skjalagoymslan og arbeiðslagið í fyrisitingini á setrinum gjørdust fyrimyndarlig undir hennara hond. Tað var góður arvur at fáa.

Og so dugdi Maud at skriva. Eisini annað enn greið fyrisitingarlig skriv. Hon skrivaði frálíkar bøkur. Fyrst Marjun og tey, sum tá hon kom í 1974 var eitt so rárt sum ein skaldsøga fyri børn. Næstan tjúgu ár seinni kom, Abbi og eg, har hon av álvara avdúkaði, at hon átti ein sera skemtingarsaman penn og sá tað stuttliga í barnatilveruni í ljósinum frá tí undarliga, sum tey tilkomnu mangan fáast við.

Maud gavst á setrinum fyri næstan trimum árum síðani og hevði fult av ætlanum. Hon skuldi skriva, hevði fleiri hugskot og onkur handrit ávegis. Hon gleddi seg til at fáa tíð og náðir at skriva. Longu í fjør komu tvær barnabøkur út. Eg skal hava ein hund um ta pásetligu Helenu, sum fær sær ein ósjónligan hund fyri at vita um hon er før fyri at ansa einum hundi. Hin bókin, sum kom út í fjør, er Likkulina og Likkudemus um Jens Paula, sum eygleiðir likkurnar og skurapisurnar. Hennara íkast í barnabókmentirnar er listaligt og gott.

Maud gekk høgt upp í leiklutin sum omma. Ommubørnini vóru ein støðug kelda til frøi og undran hjá henni, og hon kallaði tey upp í seinastu bókunum.

Maud hevði sans fyri teimum stóru linjunum, sum rithøvundur og rithøvundkona var hon íðin bókmentalesari. Tað var Maud, sum fyrst fór at tosa um at fáa Seamus Heaney hendavegin. Í 1998 hevði hon longu verið í sving, hevði skrivað til hansara, og spurt um hann ikki hevði hug at koma ein túr til Føroya. Tá ið Helga Hjørvar fór undir at stíla fyri Listastevnum, var Maud skjót at bjóða seg fram við uppskoti sínum. Heaney er nógv umbiðin, men í summar lá fyri hjá honum at koma henda vegin. Tá lá Maud tíverri longu sjúk og fekk ikki høvi at hoyra hann lesa upp.

Maud hevði uttan iva í kvittanum at fáa nógv avrikað afturat. Hon gróv tíbetur ikki talenturnar niður, vit hava fingið nógv frá henni og minnast hana við takksemi.

Æra veri minni hennara.

**Malan**